# Uttanstrok og nýkveikjari

## Ein lýsing av Tony Blair og politikki hansara



*Eftir Hanus Kamban*

***TRIÐI PARTUR***

### Heilsu- og skúlaverkið

### Sjúkrahús og útbúgving

Tá ið Tony Blair í 1997 tók við sum bretskur forsætisráðharri, var høvuðsmálið hjá honum og stjórn hansara at nútímansgera Bretland, at lætta um framtakslíkindini hjá eitt nú miðalstættini og at hækka livifótin hjá teimum lægri løntu. Serliga nógv ráddi um at bøta um skúla- og heilsuverkið, at gera ferðsluna neyvari, smidligari og stundisligari og at sleppa undan ferðsluligari samanstúgvan.

Hetta arbeiðið gekk ta fyrstu tíðina ikki eftir vild. Neyvar ætlanir trutu, kunnleiki til tað, bretar rópa *management* - t.e. leiðsluinnlit: vitan um, hvussu ein politikari umsitingarliga setur sín vilja ígjøgnum, so hann fær ítøkilig úrslit - vantaði, og mál, sum óvæntað komu og kravdu at verða loyst, t.d. Irak-krígið, órógvaðu innanríkispolitikkin.

Eftir átta ár eru kortini munagóð framstig hend. Tað enska heilsuverkið - the National Health Service, sum tann gitni Aneurin Bevan menti eftir annan heimsbardaga - er endurreist sum hornasteinur undir eini nútíðar vælferðarskipan, við ókeypis tænastu til øll. Bíðilistarnir eru kavaðir, og í dag eru fleiri tíggjutúsund fleiri læknar og sjúkrasystrar enn í 1997. Útreiðslurnar til heilsuverkið vóru fyri 2004-5 67.4 milliardir pund og fara skjótt at koma upp á 100 milliardir pund árliga.

Sami framburður er hendur á skúlaøkinum. Talið á lærarum er økt við fleiri ferðir tíggjutúsund. Síðani 1997 er peningaveiting til hvønn næming tvífaldað. Veitingar til tøkni og vísindi eru somuleiðis nógv hækkaðar. Stjórnin hevur eisini víst gávumildan vilja til at hækka útbúgvingina hjá samfelagsins stjúkbørnum. Vantandi lesi- og teljiførleiki hjá vaksnum er minkaður við 750.000, eitt tal sum kemur upp á 1,5 milliónir í 2007.

Eg skyldi lesaranum at upplýsa, at mín kelda til hesi tøl og hesar upplýsingar er blaðið *The Observer*, sum undan valinum stuðlaði Blair-stjórnini.

### Eitt rættvísari býti

Men tað størsta bragdið hjá Blair-stjórnini finna vit á búskaparøkinum. Allar Labourstjórnir undan Blair hava tað annað ella triðja árið í teirra starvstíð rent seg í búskaparliga kreppu. Blair-stjórnin hevur brotið hesa reglu, og búskaparpolitikkurin árini 1997-2005 verður hildin at vera ein tann dugnaligast førdi í bretskari søgu. Meistarin aftan fyri henda politikk er tað arbeiðssama flogvitið Gordon Brown.

Rætt er, at Blair-stjórnin arvaði ein sterkan búskap frá John Major og Margaret Thatcher. Men hon hevur megnað at varðveita hesa støðu. Ikki bara tað, hon hevur megnað at fremja ein politikk, sum bæði hevur havt við sær búskaparligan vøkstur, lága inflatión og lágt arbeiðsloysi.

Eyðkent fyri politikarar sum Margaret Thatcher og George W. Bush er, at tey einki hava ímóti, at tey sum eru illa fyri, fáa tað uppaftur verri. Her er sjónskur munur á avrikunum í USA og Bretlandi. Í USA veksur gloppið millum rík og fátæk alsamt. Undir Blair-stjórnini er tað øvugta hent.

Síðan 1997 er, sambært *The Observer* (sum vísir til frágreiðing frá *The Institute of Fiscal Studies*), livifóturin hjá teimum 10 prosentunum niðast í samfelagnum hækkaður við 10,8 prosentum. Samstundis er livifóturin hjá teimum 10 prosentunum á ovasta palli lækkaður við 4,4 prosentum. Anthony Seldon tekur lutvís undir við hesi meting, men leggur aftrat, at gloppið millum rík og fátæk ið hvussu er "ikki er víðkað".

### Norðurírland

Á tveimum øðrum økjum hevur Tony Blair megnað at fingið munagóð úrslit. Annað er tað, sum bretar rópa *devolution:* ein tilgongd, sum skal hava við sær, at størri politiskur myndugleiki verður latin tjóðskaparligum minnilutum.

Samsvarandi hesum ráki fingu Skotland og Wales longu stutt eftir, at Blair hevði tikið við sum stjórnarleiðari, hvør sítt ting. Henda royndin at andøva ímóti miðsavningini av valdinum undir Thatcher kann eisini síggjast í tí samanhangi, at av teimum báðum Labour-leiðarunum undan Blair var Neil Kinnock valisi og John Smith skoti.



*Blair á minningargudstænastu við The Cenotaph í november 2002. Margaret Thatcher, sum sæst aftan fyri hann, fekk stóra ávirkan bæði á hansara stíl og hugmyndafrøði*

Hitt málið er stríðið í Norðurírlandi. Undangongumaður á hesum øki var John Major, hvørs politikkur hevði til endamáls at skapa endaliga semju ímillum protestantar (sambandsmenn) og katolikkar í hesum landsparti, so at yvirgangurin frá báðum síðum minkaði ella helt uppat.

Meðan Tey Konservativu høvdu valdið, fekk Major fullan stuðul frá Labour í sínum semjupolitikki. Eftir at Blair hevði tikið við í 1997, brúkti hann alla sína orku til at føra royndirnar hjá Major víðari.

Lykilin til framgongd var, at Bretland skuldi standa líka óheft av sambandsmonnum (við Ian Paisly og David Trimble á odda) og tjóðskaparmonnum (við Gerry Adams og John Hume á odda). Úrslitið var tann sonevnda langa fríggjadagssemjan, gjørd í apríl 1998. Tey sjey árini síðan 1998 hevur Blair áhaldandi blást at friðarloganum. Hóast friður ikki enn er í Norðurírlandi, er harðskapurin munandi minkaður. Í 2004 doyðu bara fýra fólk orsakað av trupulleikunum, tað lægsta talið síðan 60-árini.

### Lutfalsumboðan

Tað er ikki óvanligt, at fólk, sum eru tungufim og hava lætt við at sannføra onnur, gerast orðloysingar. Tað er meira enn eina ferð kastað Blair fyri, at hann er ikki orðhaldin maður. Á ið hvussu er einum ógvuliga týðandi øki tykist hetta at vera rætt.

Sum ivaleyst mongum kunnugt, er Bretland ikki - í teirri merking, vit kenna í Norðurlondum - eitt demokratiskt land. Valskipanin byggir ikki á lutfalsumboðan, men er gjørd soleiðis, at hann ella hon, sum fær mest atkvøður í einum valdømi, verður vald(ur), og at allar taparaatkvøður fara til spillis. Hjá okkum verða taparaatkvøðurnar fyri landið taldar saman og brúktar til at býta eykaumboð eftir.

Avleiðingin av hesum er, at tinglimabýtið eftir eitt val verður órættvíst, og at henda ómakaða sundurbýting serliga rakar teir smærru flokkarnar. Á seinasta parlamentsvali kostaði (sambært opnum brævi til Blair frá Charles Kennedy, í *The Independent* 26.5.2005)) ein Labour-tinglimur soleiðis 26,877 atkvøður, ein konservativur 44,251 atkvøður og ein liberalur demokratur heilar 96,378 atkvøður. Labour fekk - við bara 36% av latnum atkvøðum og bara 22% av veljaraskaranum - ein meiriluta í parlamentinum upp á 67 tinglimir.

### Roy Jenkins svikin

Í nýggjari tíð hava serliga teir liberalu demokratarnir, við tí dugnaliga og virda Roy Jenkins sum talsmanni, virkað fyri at fáa tað, bretar rópa PR - "proportional representation" ella lutfalsumboðan. Nakað undan 1997 læt Blair seg sannføra um tað rætta í lutfalsumboðan, flokkurin bant seg til at virka fyri eini broyting, og Roy Jenkins varð settur sum formaður í eini nevnd, sum skuldi evna eitt álit til.

Men eftir at nevndin hevði skrivað sítt álit og latið stjórnini tað, valdi Blair at súlta málið. Fyri stuttum hevur Charles Kennedy, formaður hjá Teimum Liberalu, skrivliga heitt á Blair um at halda sítt lyfti. Hann vísir á, at lutfalsumboðan er galdandi fyri val til tey nýggju tingini í Skotlandi og Wales. Men einki bendir á, at Blair ella stjórn hansara ætla at halda givin lyftir.